# Faroe Petroleum keypir gassfund

**Faroe Petroleum heldur fram við at keypa seg inn í olju- og gassloyvi í Norðsjónum og hevur júst keypt seg inn í fýra loyvi á bretskum og hálendskum øki. Felagið hevur nú 21 loyvi, og eru staðfest olja ella gas á 5 av loyvunum. Felagið er við í boringini á landgrunninum og fer í 2008 at bora leitibrunn saman við ENI á landgrunninum.**

OLJA

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Faroe Petroleum heldur fram við at víðka um sítt virksemi. Nils Sørensen, stjóri í felagnum sigur við Portalin í morgun, at felagið hevur frá ConocoPhilips keypt (5,89%) í 4 loyvum, sum øll liggja í syðra parti av Norðsjónum. 2 av loyvunum eru á bretskum øki og 2 eru á hálendskum øki.

Trý av hesum loyvum eru gasfund: Minke Main, sum væntandi framleiðir frá apríl 2007, Minke Graben og Orca har avgerð um framleiðslu verður tikin seinni í 2007.

Tað 4. loyvið er eitt leitiloyvi í hálendskum øki, har Faroe Petroleum hevur 2.5%.

Hini oljufeløgini í loyvinum eru: E.ON Ruhrgas, RWE Dea, Gaz de France og Wintershall.

Góðtaka mynduleikarnir útbyggingarætlanina verður nettoparturin hjá Faroe Petroleum frá Minke Main 2.45 milliardir kubikføtur av gassi. Kostnaðurin av útbyggingini verður mettur til umleið kr. 500 mill., og parturin hjá Faroe Petroleum av hesum er mettur til umleið kr. 30 mill. sigur Nils Sørensen, stjóri í Faroe Petroleum.

6. juni í ár keypti felagið eisini 10% í gassfundinum Breagh frá Sterling Resources (UK), sum eisini liggur í syðra parti av Norðsjónum. Ein ætlan um at bora ein avmarkingarbrunn á loyvinum verður viðgjørd av pørtunum.

Við hesum keypum hevur Faroe Petroleum nú 21 loyvi, og eru staðfest olja ella gas á 5 av loyvunum.

Faroe Peroleum hevur einini latið umsóknir inn til 24. bretsku rundu, og arbeiðir nú við 2006 útbjóðingarrunduni í Noregi upplýsir Nils Sørensen.




*Atlantic Petroleum hevur keypt part í fýra loyvum í Norðsjónum*

## Summarhugni í bygdini

**Oyndarfjørður:** Leygardagin 12. august verður summarhugni í Oyndarfirði. Tiltakið er bæði fyri børn og vaksin.

Á skránni verður millum annað undirhald, grill, felagssangur, hugleiðing og dansur. Byrjað verður kl. 17. og hildið verður áfram út á náttina.

Hetta er fyrstu ferð at eitt tílíkt tiltak verður hildið í bygdini. Tað er nevndin fyri ítróttarfelagið í bygdini, sum hevur tikið stig til tiltakið.

Ætlanin er at summartiltakið skal verða afturvendandi, og bygdarfólkið vónar tí, at nógv fólk kemur á vitjan í Oyndarfirði hendan dagin.

**sb.**

## Operakonsert í heimbýnum

**Vágur:** Leygarkvøldið fáa vágbingar og suðringar eitt forvitnisligt høvi at sleppa til operakonsert undir opnum himli.

Hetta hendir tá Susanne og Rúni Brattaberg enn einaferð fara á "pall" leygarkvøldið kl. 19 í Kleivini á Vágseiði, saman við amerikanska pianistinum Christopher Arpen. Mikukvøldið høvdu tey nevniliga konsert í gjónni í Elduvík.

Rúni byrjaði sína sangkarrieru í kirkjukórinum Ljómi fyri eini 20 árum síðani. Hann hevur áður sagt, at lærutíðin í kórinum var høgt í metum, og var eitt gott grundarlag fyri tí, sum hann nú fæst við.

Á skránni á konsertini eru tónlistarligar perlur frá kendu operaverðini. Ágóðin av konsertini fer til nýggja Ljómhúsið, sum kirkjukórið Ljómur keypti fyrr í summar. Endamálið við hesum húsinum er at verða savningarstað til felagstiltøk, umframt at listafólk sum vitja Suðuroynna kunnu gista her.

Atgongumerki til konsertina kosta 100 kr., írokn að ábit og kaffi. Skuldi tað ikki viðrað, verður konsertin í kirkjuni í Vági.

**sb.**



*Djúpa røddin hjá Rúna Brattaberg verður nú at hoyra á Vágseiði*

FØROYA HANDILSSKÚLI

TEAM85

**AkademiMerkonom**
**Heysthálvan 2006**

Treytað av nóg stórari luttøku verða í heyst hesar lærugreinar á AkademiMerkonom

**Lærugreinar:**
Hagfrøði
Vinnubúskapur
Altjóða samskifti
Human Resource Management

**Undirvísingin byrjar í viku 36 og verður eitt kvøld um vikuna frá kl. 18.00 til 21.20. Próvtøkurnar verða í januar 2007.**

**AkademiMerkonom** er ein akademi-útbúgving, sum er á útbúgvingarstigi beint undir bachelorstigi.

**Innskrivingarseðil, upptøkutreytir og upplýsingar um AkademiMerkonom finnur tú á heimsíðu skúlans www.fh.fo ella við at ringja til skúlan.**

**Umsóknarfreistin er 21. august 2006**

**FØROYA HANDILSSKÚLI**
Postsmoga 177 · 110 Tórshavn · Tel 317177 · Telefax 313374
**Heimasíða skúlans: www.fh.fo**